## DAGSINS MEINING

# Frælsi meirkir ábyrgd

Frælsi merkir ábyrgd segði George Bernard Shaw sum kunnugt í 1903, men hann hevur neyvan grunað, at orð hansara fóru at vera nýtt ella misnýtt í føroyskari tjóðveldisagitatión nærum 100 ár seinni.

Um man við einari fólkaatkvøðu bindir trý komandi løgting og landstýri til at fremja yvirtøkur eftir ætlanini hjá núverandi samgongu, so tekur man frælsið til at disponera frá komandi politikarum. Er dispositionsfrælsið burtur, so er ábyrgdin eisini burtur hjá komandi løgtingum. Fer ein yvirtøka at ganga illa í ár 2006, so kunnu politakarar tá bert yppa øksl og peika aftur um seg og siga, at samgongan í 2001 legði hesa ætlan og ikki teir.

Tað tykist sum um, at samgongan ikki hevur álit á eftirfylgjarum sínum í Tinganesi, og má hettar vera ein ásannan av, at núverandi samgonga væntar at missa meirilutan til næsta val.

Einasta søguliga í hesum valskeiðnum er, at Tjóðveldisflokkurin fyri fyrstu ferð nakrantíð gjørdist størsti flokkur. Tað er einki, ið hendan samgongan fær gjørt á sjálvstýrisleið, sum komandi samgongur ikki kunnu gera, og tí er ikki talan um nakran søguligan møguleika, men heldur um eina søguliga sæð einastandandi ómynduggering av øllum teimum, ið koma at fáa valrætt tey næstu trý valskeiðini

Fólkaatkvøðan í mai var í besta føri óneyðug og er í veruleikanum ein grov provokatión, ið viðførir, at vit enda aftur í fýra ára skiftistíð. Blokkstuðulin er tilætlaður eina útjavning í danska kongaríkinum, har endamálið er, at eitt nú heilsu- og almannamál skulu vera á einum vælferðarstøði, sum sømir seg einum skandinaviskum vælferðarsamfelag. Heilsuverkið er niðurprioriterað samstundis sum Føroya Landsstýri gongur og erpar sær av einum metstórum yvirskoti á fíggjarlógini. Tað er rættiliga naivt at halda, at danska stjórnin bert fer st sita og hyggja at, meðan vælferð verður niðurskorin, samstundis sum blokkstuðulin verður koyrdur í ein fullveldisgrunn.

Vilja føroyingar koma fram á sjálvstýrisleið aftaná trý ára naggatódn undir sitandi samgongu, so krevst, at man brýtur upp ermar og fyrireikar yvirtøkur. Tann besta gávan eitt landsstýri kann geva komandi landsstýrum er vælfyrireikað grundarbeiði, soleiðis at hesi komandi landsstýri hava frælsi til at taka støðu út frá fotreytunum og harvið eisini fáa fullu ábyrgdina av framdum yvirtøkum.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



### Tey av Kamarinum í 45 ár

Í kvøld fer Rás2 undir eina drúgva sending um og við Teimum av Kamarinum. Sendingin hevur fingið heitið »Nicolina í 45 ár«. Fyrri partur av sendingini kemur kl 20, og seinni partur byrjar kl 21.30.

Í sendingini fara vit at hoyra gamlar upptøkur úr Havnar Klubba, har Tey av Kamarinum spæla til dans. Hópur av fólki fara at greiða frá ymsum í sambandi við Tey av Kamarinum, vit fara m.a. at hoyra Marius Rein, Milson Zachariassen, Petur Olivar í Hoyvík, Poul Michelsen, Birgar Johannesen og Jan Christiansen.

Í sendingini verða sum sagt nógvar gamlar upptøkur við Teimum av Kamarinum, men vit fara eisini at hoyra spildurnýggjar upptøkur, m. a. seks løg, sum ongantíð áður eru spæld alment. Í seinna helmingi av sendingini fara Tey av Kamarinum eisini at undirhalda beinleiðis úr Studio 4 á Rás 2.

## Takk

Øllum tykkum, sum mintust okkum og gjørdu okkum silvurbrúdleypsdagin so hugnaligan, takka vit hjartaliga.

**Margretha og Finn Christiansen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri alla góða hjálp,
heilsanir og samkenslu, tá ið kæra kona mín,
mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Elma Mortensen**

andaðist og varð jarðað.

Takk til heimahjálpina
fyri umsorgan tey mongu árini,
fyrst í Vestmanna, síðani á Argjum
og at enda í Nesi í Hvalba. Takk til fólkið í Nesi.
Takk til Høgna Poulsen, prest, sangarar
og fyri luttøku í jarðarferðini úr Argja kirkju.
Takk fyri minningarhaldið í missiónshúsinum,
takk fyri uppringingar og fyri góða minningargávu
til Leguhúsið í Nesvík.
Guds friður veri við okkum øllum.

Familjunnar vegna
**Johannes Mortensen, trúboðari**

†

Kunngjørt verður, at okkara kæri maður, pápi, abbi,
verfaðir, sonur og bróður

**PÓL JOHANNUS HANSEN,**
**Hósvík**

andaðist í heiminum hósnáttina 8. feb. 2001,
49 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju
sunnudagin kl. 14.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

Fyri tey avvarðandi
**Dagny, Elin, Sonni, Sóley, Elsa, Maria,**
**Pól Niklái og Dagný**

Tey, ið vilja minnast Pól Johannus kunnu lata eina gávu til Nýrafelagið konto í
Føroya Banka, 6460 158.141.6
Føroya Sparikassa 9181 130.873.6
Suðuroyar Sparikassa 9870 101.368.9

†

Kæri pápi, abbi og verfaðir okkara

**FINN KVISTGAARD OLSEN**

andaðist í Keypmannahavn 6. februar,
61 ára gamal.

Jarðarferðin verður mánadagin 12. februar kl. 13.00
úr Nataliens kirke, Holmbladsgade,
2300 Keypmannahavn.

Familjunnar vegna
**Janet, Linda og Carl**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



Vaktar- og Bjargingartænastan liggur enn einaferð lamin:

# Vaktarskipið Tjaldrið lagt

**Ósemjan ímillum Landsstýrið og Skipara- og Navigatørferlagið hevur enn einaferð ført ið sær, at vaktarskipið Tjaldrið er lagt**

TRYGD Á SJÓNUM
*Áki Bertholdsen*

Nú er arbeiðið hjá Vaktar og Bjargingartænastuni enn einaferð at kalla lagt lamið.

Tí samstundis, sum Brimil ikki sleppur til landið, er vaktarskipið Tjaldrið nú eisini lagt.

Sostatt hevur Vaktartænastan í løtuni bara Spógvan á at líta, men tað er sjálvsagt sera avmarkað, hvat kann kann gera, tí hann er so lítil.

Tað er ósemjan um Brimil, sum hevur ført til, at Vaktarskipið Tjaldrið nu er lagt.

Og hetta er aðru ferð, at Tjaldrið liggur orsakað av ósemjuni um Brimil.

Orsøkin til, at Tjaldrið nú ikki sleppur út aftur, er, at ongir stýrimenn eru at mynstra við.

Fyrru ferð, Tjaldrið lá, var tað eisini tí at stýrimaður manglaði. Tað var fyrr í ár og tá lá Tjaldrið tí at ein stýrimaður varð sjúkrameldaður.

Ætlanin var síðani at fáa ein avloysara umborð, men tað setti Skipara- og Navigatørfelagið ein stoppara fyri.

Felagið kravdi at Vaktar- og Bjargingartænastan skuldi fáa ein av stýrimonnum, sum annars skuldi við Brimli, umborð á Tjaldrið. Samstundis bannaði felagið øllum øðrum stýrimonnum at fara umborð á Tjaldrið

Tað vildi Vaktar-og Bjargingartænastan ikki og sostatt lá Tjaldrið, til tað fekk eitt nýtt manningarskjal sum gav tí undantaksloyvi at sigla við bara einum stýrimanni. Men siglingin varð nógv skerd við tað, at við bara einum einum stýrimanni kundi Tjaldrið ikki vera longri úti enn í 12 tímar ísenn, og tað kundi samstundis ikki fara longri út enn 30 fjórðingar.

### Støðan enn verri nú

Men nú er støðan støðan hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni blivin enn truplari.

Stýrimaðurin, sum varð sjúkrameldaður fyrr í ár, ern sjúkrameldaður enn. Og hin stýrimaðurin er nú farin í farloyvi vegna sjúku í familjuni.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, sigur, at tað hevur hann fullan rætt til eftir sjómanslógini.

Sostatt er ongin stýrimaður, sum kann fara við Tjaldrinum.

Og tí sleppur Tjaldrið ikki at loysa aftur.

Tjaldrið liggur á Havnini, og eftir ætlan skuldi tað fara útaftur hósdagin. Men tað slapp tað ikki og á miðdegi í gjár var framvegis ongin loysn funnin.

Ellintur Abrahamsen sigur, at felagið heldur fast um, at aðrir stýrimenn enn teir, sum ætlandi skuldu við Brimli, skulu ikki við Tjaldrinum.

– Vaktar- og Bjargingartænastan hevur stýrimenn tøkar, sum kunnu fara við Tjaldrinum. Men hon vil heldur, at Tjaldrið verður lagt enn at lata teir fara við, sigur Ellintur Abrahamsen.

Hann vísir á, at stýrimenninir, sum ætlandi skuldu við Brimli, eru settir í starv hjá reiðaranum. Teir eru ikki settir í starv umborð á ávísum skipi og kunnu tískil saktans fara við Tjaldriunum.

– Men at Vaktar- og Bjargingartænastan ikki vil brúka teir, kunnu vit ikki gera við, leggur hann afturat.



*Vaktarskipið Tjaldrið er aftur nú lagt. Tað er ósemjan um Brimil, sum nú eisini rakar Tjaldrið. Hetta er aðru ferð í ár, at Tjaldrið er rakt av arbeiðssteðgi, sum ósemjan um Brimil er atvoldin til*

Nýtt í Føroyum

Í sambandi við framsýningina av nýggja bilverkstaði okkara, sýna vit fram tvey flunkandi nýggj modell frá Ford

**Vit presentera spildurnýggja Ford Transit Turbodiesel fyri føroyingum, smidligasta og mest fjølbroytta vøruvognsloysnin í heiminum.**




Listin av møguleikum er so langur at tað næstan ikki er til at fata. Ert tú handverkari, hevur tú heilsølu, transport-firma, ella skal tú brúka bilin til persónstransport? Tað eru 54 ymisk basismodell í Ford Transit Turbodiesel at velja í millum, sum kunnu tillagast einhvørjum tørvi. Forhjólstrektir ella bakhjólstrektir, kassa ella last, ella tær nýtist kanska køling? Lat okkum geva tær eitt persónligt tilboð uppá tín egna Transit, sum nøktar tín serliga tørv.
Oljufýring er standardútgerð.

**Tann nýggi Mondeo Turbodiesel er nú í Føroyum - hetta er bilurin øll tosa um, hann er ljósár frammanfyri, kann ikki lýsast við orðum, men má síggjast og roynast. Nú eisini heilgalvaniseraður.**




**Hetta fer fram hjá P/f Wenzel leygardagin 10.02. -2001 frá kl. 10-16 á nýggja bilverkstaði okkara**

**P/f Wenzel**

**Við Velbastaðvegin · Tlf. 354500 · Boks 3043 · 110 Tórshavn · www.wenzel.fo**

Sosialurin - 311820